# Aldarinnar poppur frá Aldubáruni

**Tíðindaskriv**

Komandi vikuskifti verða Býráðshøllin í Runavík og Norðurlandahúsið karmar um eina nýskapandi klassiska konsert. Tað er tónleikabólkurin Aldubáran sum heilsar várinum vælkomnum við tveimum konsertum undir heitinum »Franskar freistingar«, har lættur franskur tónleikur er á skránni. Heili níggju smærri verk verða framførd á konsertunum, summi av teimum eru tó bert nakrar minuttir til longdar. Tey flestu verkini eru av fronsku tónaskøldunum Ravel, Debussy og Saint-Saëns. Heiti »franskar freistingar« sipar til, at konsertin hevur nakað meira at bjóða enn bert freistingar fyri oyruni.

**Eksklusiv uppliving**

Í steðginum borðreiður kokkurin Leif Sørensen við cannapé og guitartónleikur verður afturvið. Eisini verður nakað serligt gjørt burturúr skránni og hartil verður eitt frásøgufólk at leiða áhoyrararnar ígjøgnum freistingarnar. Hugskotið er at geva fólki eina eksklusiva heildaruppliving og skapa eina løtumynd við íblástri frá øðrum londum, í hesum føri, frá Frankaríki.

**Tónleikararnir**

Fimm tónleikarar mynda Aldubáruna til hesar konsertirnar og tey eru Andrea Heindriksdóttir, floytu, Jógvan Zachariassen, faggott, Øssur Bæk, violin, Brian Friisholm, sello og Frode Stengård, klaver. Brian Friisholm úr Danmark hevur fyrr verið her heima og spælt við Aldubáruni, men hetta er á fyrsta sinni, at kendi danski klaverleikarin Frode Stengård er í Føroyum og spælir við Aldubáruni. Frode hevur útbúgving frá Jyske Musikkonservatorium í 1972 og arbeiðir í dag sum docentur á sama skúla. Frode Stengård er eisini organistur í Skanderborg Slotskirke og fastur klaverleikari hjá Århus Symfoniorkester. Frode Stengård er sera virkin konsertklaverleikari og hevur útgivið fleiri fløgur. Nú hava vit so møguleikan at hoyra hann her heima saman við landsmanninum Brian Friisholm og trimum limum úr Aldubáruni.

**Hvar og nær**

Tann fyrra konsertin verður leygardagin 4. mai kl. 19:30 í Býráðshøllini í Runavík, og tann seinna sunnudagin 5. mai kl. 19:30 í Norðurlandahúsinum. Atgongumerkir á 150,- kr eru at fáa í Norðurlandahúsinum og í Kunningarstovuni í Runavík og í Havn. Allar freistingar eru við í prísinum. Stuðlað konsertunum hava Norðurlandahúsið, og Runavíkar Býráð.

# Aldubáran á alnótina

**Tíðindaskriv**

Mikudagin 1. mai verður nýggja heimasíðan hjá Aldubáruni løgd út á alnótina. Heimasíðan er á enskum og er fyrst og fremst ætlað sum eitt visitkort til útheimin og ein roynd hjá Aldubáruni at bjóða seg fram sum ein professionellur tónleikabólkur á altjóða støði. Tó er ein partur av tekstinum føroyskur. Tað er ReproZ, sum hevur staðið fyri formgávuni av síðuni, og sniðið endurspeglar tað, sum Aldubáran er kend fyri at framføra, nevnliga nýggjan klassiskan tónleik. Á heimasíðuni er kunning um bólkin og teir einstøku limirnar í bólkinum. Hartil ber til at lesa um konsertskránna, ummælir av konsertum uttanlands, lurta eftir ljóðfílum og finna slóðir til aðrar viðkomandi heimasíður, m.a tær hjá stuðulunum hjá Aldubáruni. Adressan er www.aldubaran.fo

# Útnorðurnráðið á evnisráðstevnu Norðurlandaráðsins

Á evnisráðstevnuni hjá Norðurlandaráðnum 15. og 16. apríl luttók eisini Útnorðurráðið.

Útnorðurráðið hevði mánadagin, 15. apríl fund við formansskap Norðurlandaráðsins.

Luttakararnir frá Útnorðurráðnum vóru Hjálmar Árnason, formaður, og Jógvan Durhuus, næstformaður. Hjálmar Árnason greiddi frá Útnorðurráðnum.

Seinni hevði Útnorðurráðið eina hoyring fyri mentanarnevndini hjá Norðurlandaráðnum.

Jógvan Durhuus, næstformaður, greiddi frá Útnorðurráðnum, um tað politiska arbeiðið í ráðnum. Seinni hevði Sølvi Sveinsson, lektari, fyrilestur um mál í útnorði og Jón Ingvi Jóansson, bókmentafrøðingur, tosaði um bókmentir í útnorði.

Seinni hevði Benadikt Thorsteinsson, fyrrverandi landsstýrislimur í Grønlandi og fyristøðumaður fyri mentanarhúsið fyri útnorður í Hafnafirði, fyrilestur um mentanarsamstarvið í útnorði.

Eitt av teimum málum, sum verður viðgjørt í mentanarnevndini, er uppskotið hjá moderatarna »Ett handslag til Vestnorden«. Mittergruppen skjýtur upp, at Norðurlandaráðið tilmælir til norðurlendska ráðharraráðið um at gera útnorður meira sjónligt bæði innan norðurlond og í Europa.

















































